NIGER 08



spæla ein sera stóran leiklut í broytanini av samfelagnum og eitt av høvuðsendamálunum við verkætlanini er tískil at fokusera uppá útbúgving sum ein miðil til bæði at kunna íbúgvarnir, men eisini til vónandi at broyta siðbundna hugburð fólksins m.a. viðvíkjandi gentum, sum í Niger oftast verða giftar, júst eftir at tær hava fingið fyrstu mánasjúku teirra.

- Í dag ger skúlin í Niger einki fyri at royna at broyta samfelagið og virka fyri at munirnir millum fólk verða minni. Í einum vanligum skúla eru bert dreingir, sum eru av einum ávísum etniskum uppruna, sigur Marianne Haahr, sum í mong ár hevur starvast í CARE við m.a. at økja um hjálpina til Niger. Skúlaverkætlanin skal tryggja, at bæði dreingir og gentir við ymiskum etniskum uppruna kunnu fáa møguleika at nema sær útbúgving og harvið fáa størri møguleika, enn foreldur teirra hava havt, fyri at tryggja sær eina bjartari framtíð í einum meira modernaðum samfelagi.

Við at seta tey sera ymisku børnini í skúla saman vónar Marianne, at man kann minka um trupulleikarnar millum etnisku bólkarnar í Niger. – Tað er grundleggjandi at virða ymiskleikarnar millum børnini ístaðin fyri at royna at minka um teir, sum skúlarnir í Niger gera í dag. Menningin skal ístaðin byggja uppá fólksins præmissir og ganga út frá gerandisdegi teirra. Við at lána kvinnunum í Niger asn sum kompensatión fyri hjálpina hjá gentunum við hús, halda langar døgurðasteðgir, har børnini kunnu hjálpa foreldrum teirra, og stongja skúlan, tá ið nomadubørnini ferðast við familjum teirra, vilja CARE og OD í felag skapa eitt nýtt og øðrvísi slag av skúlum sum alternativ til siðbundnu statsskúlarnar. Undirvíst skal vera á móðurmálunum hjá einstøku børnunum, umframt at tað eisini skal undirvísast í praktiskum tingum, sum børnini sjálvi kunnu brúka heima við hús hjá familjunum.

Tað hevur víst seg, at áhugin fyri at læra er stórur bæði millum vaksin og børn í Niger og tað sær út til, at nógv eftirhondini hava innsæð, at broyting er einasti vegurin fram. Umframt at undirvísa børnunum í Niger, vilja felagsskapirnir tí eisini geva teimum vaksnu møgulleikan fyri at læra at lesa og skriva um kvøldarnar so eisini tey fáa størri menningarmøguleikar.

### Føroyar í ljósinum

Eitt annað evni, sum hjálparfelagsskapurin ætlar at varpa ljós á komandi skúlaár, er, hvussu man kann gera fyri at fáa føroyskar skúlar at vera meira aktivir í hjálpararbeiðinum hjá felagsskapinum.

Seinastu tíggju árini hevur Studentaskúlin í Hoydølum trúliga luttikið í stóra hjálpararbeinum, meðan tað higartil hevur verið truppult at fáa aðrar miðnámsskúlar kring landið at luttaka. Nøkur umboð úr skrivstovuni í Danmark koma í heyst til Føroyar fyri at fara runt á ymisku miðnámsskúlarnar at greiða nærri frá OD-arbeiðinum, Niger og hví tað er so týdningarmikið at fáa ung inn í hjálpararbeiðið.

- Viðhvørt haldi eg, fólk hava trupult við at síggja út um teirra egna lítla heim. Tað er so nógv lættari ikki at hugsa um stóru trupulleikarnar, sum eru kring heimin í dag, men jú longur tíð gongur, áðrenn vit síggja, at hjálpin er neyðug, størri og verri verða trupulleikarnir, sigur Heiða Nolsøe. – Um man sum ungur fer undir hjálpararbeiði, trúgvi eg, tað skapar møguleikar fyri, at man heldur áfram við hesum restina av lívinum. Tað hevði tí verið so deiligt, um tað eisini bar til at fáa føroyskar ungdómar við í stóru OD-verkætlanina í ár, so tey eisini kundu verið við til at stuðla gloymda landinum Niger, har tørvurin á hjálp avgjørt er rættiliga stórur.

## UM NIGER

1. Í dag búgva umleið 12 milliónir íbúgvar í Niger. Fólkavøksturin er her tann størsti í heiminum, miðallivialdurin er bert uml. 44 ár í Niger og helvtin av íbúgvunum er tískil undir 15 ár.
2. 85-90% av íbúgvunum eru analfabetar og tørvurin á útbúgvingarmøguleikum er tí sera stórur í landinum, har so at siga øll starvast í primeru vinnuni.
3. Íbúgvarnir í Niger eru sera ymiskir við fleiri ymiskum fólkasløgum, málum og religiónum (islam er langt tann størsta religiónin í Niger, men fleiri ymiskir undirbólkar eru í landinum).
4. Niger er eitt stórt land og fevnir um 1.267.000 km2 (t.e. størri enn Týskland, Frakland og Póland tilsamans), men stórir partar av landinum eru ódyrkaðar oyðimørkir og í hesum økjum búgva heilt fá fólk.
5. Áðrenn Niger varð ein fronsk koloni í uml. 1880, vóru ymisk stór og smá høvdingadømi kring landið. Við koloniseringini vórðu hesi avtikin og partvíst integreraði í nýggja franska stýrið. Eftir í mong ár at hava verið stýrt av franskmonnum, varð Niger sjálvstøðugt í 1960. Franskt er tó framvegis offisielt mál í Niger og Frakland er eisini framvegis størsti fíggjarligi stuðulin hjá Niger.
6. Veðurlagið í Niger er tropiskt við regntíð í sunnara partinum av landinum frá juni til september, meðan als eingin regn er í norðanligum pørtum av landinum. Hetta ger, at jørðin í Niger er rættiliga ring at dyrka.



Tíðindaskriv frá Norðurlandahúsinum:

# Teitur og orkestur konsert í Norðurlandahúsinum



Nú er endaliga greitt at Teitur, saman við orkestri, kemur til Føroya at hava konsert í stóra salinum í Norðurlandahúsinum. Konsertin verður mikukvøldið 27. august, kl. 19.30. Hetta er fyrsta konsertin Teitur hevur í Føroyum í meira enn ár og samstundis fyrsta konsertin síðan vælumtókta fløgan The Singer kom út fyrr í ár. Roynt hevur verið at fingið Teitur at lagt leiðina framvið í Føroyum, men torført hevur verið at finna ein dag, sum passar øllum pørtum. Teitur er nógv umbiðin at spæla uttanlanda. Beint áðrenn Teitur kemur til Føroyar skal hann spæla á einum festivali í Salzburg og beint aftaná konsertina í Føroyum hevur tey konsert í London.

Teitur gav út fløguna ”the Singer” fyrr í ár. Fløgan hevur fingið sera góð ummælið bæði í Føroyum og uttanlanda. Teitur fekk heiðurin at verða fyrstur á stóra Orange pallinum á Roskilde Festivalinum 2008.

Atgongumerki til konsertina fáast á kunningarstovunum í Havn, Fuglafirði, Runavík og Klaksvík og á www.nlh.fo

# Stórur áhugi fyri festival-plássum



Áhugin fyri Summar Festivalinum er sera stórur, og tað merkja tey eisini á Norðoya Kunningarstovu, har tey umsita plássini til tjøld, húsvognar og bátar á Summar Festivalinum. Longu nú hava sera nógv fólk tryggjað sær pláss til tjaldið, bátin ella húsvognin, men á Kunningarstovuni ivast tey ikki í, at enn fleiri fara at biða um pláss. Fyri at tryggja, at plássini verða væl býtt, og arbeiðið væl skipið, heitir Kunningarstovan nú á fólk um at biða um pláss í seinasta lagi mánadagin 4. august. Summar Festivalurin verður hildin í døgunum frá 7. til 9. august.